# Toskurin á Føroyabanka

## – hvussu er støðan í 2020?





**Petur Steingrund**
fiskifrøðingur

**Hóast Magnus Heinason fekk nógvan tosk á Bankanum í mars 2020, var lítið at fáa í september. Neyðugt er við fleiri kanningum fyri at staðfesta, hvussu støðan er við toskinum á Føroyabanka.**

Toskurin á Føroyabanka fyllir vanliga nógv í huganum hjá føroyingum. Sum kunnugt varð nógv fiskað av toski á Føroyabanka eftir ár 2000 og í 2003 var veiðan heili 5.600 tons. Nøgdirnar minkaðu skjótt, og í 2006 var sera lítið at fáa av toski á Føroyabanka, einans 950 tons.

Bankin, grynri enn umleið 200 m dýpi (Mynd 1), hevur verið friðaður síðan 2009 fyri at fáa toskin at koma fyri seg aftur. Í 2017 vóru tekin um, at hýsan á Føroyabanka kom fyri seg aftur og tað sama hendi við toski og hýsu á Landgrunninum – men striltið gekst at fáa toskin á Føroyabanka á føtur aftur.

Í Sjóvarmáli 2019 var ein drúgv grein skrivað um, hví toskurin á Føroyabanka ikki var komin fyri seg. Har vóru ymiskir møguleikar nevndir, millum annað at gýtingarstovnurin, sum er ein avgerðandi fortreyt fyri framtíðar stovnsstødd, var ov lítil.




*Mynd 1. Stongdu økini á Føroyabanka. Myrkagrøna økið er fiskibannað alt árið, tó við nøkrum undantøkum. Ljósagrøna økið er fiskibannað tríggjar mánaðar av árinum, frá 1. juni til 31. august.*




*Mynd 2. Nøgd av toski í yvirlitstrolingunum í mars og september á Føroyabanka.*







*Mynd 3. Nøgd av toskayngli í yngulkanningunum í juni/juli á føroyska landgrunninum og á Føroyabanka. Legg til merkis tær smáu nøgdirnar á Føroyabanka á myndini vinstrumegin. Høgrumegin er zoomað inn á nøgdinar av toskayngli á Føroyabanka (reyða økið á myndini).*

**Skiftandi úrslit**

Á yvirlitstrolingini í september 2019 var nakað meira at fáa enn vanligt og eisini var sera nógv at fáa í mars 2020 (Mynd 2). Hinvegin vístu línuroyndir frá mai til september 2020, at tað var lítið til av toski á Føroyabanka. Yvirlitstrolingin í september 2020 vísti, at toskurin á Føroyabanka var framvegis ikki komin fyri seg aftur, hóast nøgdin var eitt vet størri enn vanligt seinastu árini.

**Møguligar orsøkir**

Vanliga eru nógv færri toskayngul á Føroyabanka enn á Landgrunninum – lutfallið er á leið 1:50 (Mynd 3, vinstrumegin). Heili 7 ár vóru færri enn 5 toskayngul per hál (á 30 minuttir) í yngulkanningunum í juni/juli á Føroyabanka.

**Støddin á gýtingarstovninum hevur týdning fyri komandi árgangsstyrki hjá toski á Føroyabanka**

Tó er vert at leggja til merkis, at í 2015, 2016 og 2020 var eitt vet meira av toskayngli á Bankanum (Mynd 3, høgrumegin).

Toskurin á Føroyabanka er fullvaksin, umleið 83 cm langur, tá hann er 4 ára gamal. Tað er eitt positivt samband millum nøgd av toskayngli og nøgd av toski í yvirlitstrolingum fýra ár seinni. Hetta bendir á, at støddin á gýtingarstovninum hevur týdning fyri komandi árgangsstyrki hjá toski á Føroyabanka. Umframt hetta er eisini møguligt, at tann heiti sjógvurin á Føroyabanka hevur havt neiliga ávirkan á toskayngul. Ein samanrenning av ov stórum veiðutrýsti eftir ár 2000 og óvanliga heitum sjógvi eftir ár 2003 kann hava ført við sær, at tað gjørdust ov fá toskayngul á Føroyabanka og at stovnurin fór niður í einki og helt sær har í fleiri ár.

Havast skal í huga, at Føroyabanki tolir ikki nógva roynd og tí má ein framtíðar vinnuligur fiskiskapur á Føroyabanka stýrast við skynsemi.